

Húskið fyri oman Oyruna:
**Standandi f.v.** Óli, yngri, Hanna, Erikka, Petra og Sofus.
**Sitandi** Johan Salomon, Esther og Julianna



*Gregers Gregersen, f. 1879, d. 1903 (Grækaris fyri oman Oyruna) burturgingin við Cyclone 24 ára gamal. Hann var pápabeiggi Sofus*



*Trý lið av børnum fyri oman Oyruna umleið 1914. Dreingirnir eru* ***f.v.*** *Olivur Mikkelsen og Óli hjá Johan Salomon. Óli doyði sum smádrongur. Genturnar eru* ***f.v.*** *Oluffa, Petra og Erikka. Tað vóru Oluffa, Óli og Oluffa, sum lógu í vøggu samstundis*

Størsti áhugin var var at sleppa at fiska.

Mammu dámdi ikki, at vit fóru á seiðaberg. Henni dámdi nógv betri, at vit fóru við báti. Hon helt vist, at tá var minni vandi fyri at vera áhaldsin og fara á sjógv.

Eg og Hanna systir plagdu at fara við bát út við Løgdalsá við tráðu, har vit kundu fáa reyðfisk.

Vit plagdu eisini at stinga fliður. Tað var so nógv til, at onkur seldi til agn,.

## Har tað er hjartarúm..

Húsið hjá Óla og Petru, ommu og abba Sofus, var eitt gott dømi um, hvussu familju-og sosiala skipanin virkaði í gomlum døgum. Tann berandi í hesi frásøgnini hevur verið omman Petra, sum hevur verið eitt rættiligt konubrot og eitt stórt menniskja. Avrikið verður ikki minni av, at maðurin Óli sum sagt sat blindur í nógv ár.

Johan Salomon og Julianna giftust inn til teirra. Her búðu frammanundan eldri skyldfólk. Tey fingu sítt fyrsta barn, Óla, í 1907. Inni har búði eisini systirin Anna Malena við dóttrini Oluffu, sum eisini var fødd í 1907.

Í 1906 fekk kona Jógvan á Lakjuni ein son, Olivur. Vegna umstøðurnar heima kom Jógvan og spurdi, um ikki sonurin kundi vera hjá teimum fyribils. Tað var so gamaní. Men umstøðurnar gjørdu, at Olivur var verandi, og gjørdist hann sum eitt av systkjunum hjá Johan Salomon og teimum, hóast hann eisini hevði samband við síni foreldur og systkin. Hevði tað verið í dag, hevði Almannastovan skulla verið við í leikinum við málsviðgerarum og sálarfrøðingum. Men her fekk Olivur eitt nýtt heim uttan nakað roks. Tískil vóru í 1907 tríggjar vøggur í húsinum í senn!

Olivur varð fullkomiliga roknaður sum ein partur av húskinum. Hann gjørdist gubbi fostursystrina Esther og systkinabarnið Petru (Arge) hjá Jóan Elias.

Í fólkateljingini í 1911 sæst, at tá vóru tey 13 fólk í húsi. Tá høvdu Johan Salomon og Julianna fingið fleiri børn. Afturat hesum var nú eisini Elia, systir Johan Salomon gift inn, og hevði fingið sítt fyrsta barn, so her hevur verið rættiligt hjartarúm. Árið eftir í 1912 verður Petra fødd.

Seinni í hesum parti verður greitt frá Grækaris á Gørðum, sum var ein skyldmaður. Tá ið Grækaris doyði í 1890 flutti konan Malena og dóttirin Súsanna inn til teirra. Dóttirin var brekað, og tær báðar búðu hjá teimum alla sína tíð. Dóttirin skuldi vera sálarliga brekað, og bygt var henni eitt lítið rúm í roykstovuni, so hon ikki gjørdi skaða uppá seg sjálva ella onnur. Súsanna doyði í 1893, 33 ára gomul.

Grakaris var belisin maður. Sofus minnist, at nógvar bøkur hjá honum vóru inni hjá teimum.

Grækaris hevði tann trupulleika, at hann dugdi ikki at drekka. Hann doyði í brúdleypinum, tá Nella giftist upp aftur við Peter Jakku. Grækaris hevði eina mørk í jørð. Hon fygldi møðgunum og er framvegis í húsinum Fyri oman Oyruna.

Tað verður eisini sagt um hana, at tá brúk var fyri hjálp í bygdini, vórðu boð send eftir Petru. Maðurin Óli hevur eisin havt virðing fyri konuni. Tá í tíðini var ikki vanligt, at konan varð spurd um nakað sum helst. Petra Arge greiðir frá, at tá ið kona Grækaris spurdi Óla um hon og dótturin kundi koma til teirra, tá mátti hann fyrst spyrja konuna! Og tað var sum skilst gaman í.

Familjan er sera hørm um, at tey vita so lítið um Petru, hetjuna í hesi søgu. Táið Gregersenættin skuldi hava ættarveitslu í 1997, fanst eingin mynd av Petru. Men hon væl og virðiliga uppkallað av børnunum.

## Olivur var feigur

Fosturbeiggin Olivur fekk eina serliga lagnu. Hann var fiskimaður. Einaferð hann kemur til Havnar, leggur fostursystirin Petra, sum búði Havn, til merkis, at hann hevði eitt kuffert við sær. Eingin fekk at vita hvat var í kuffertinum.

Seinni kemur Petra eftir, at hann hevur verið á Heimavirkinum og selt síni føroysku klæði. Hetta undraði, tí tað var heilt óvanligt at selja síni føroysku klæði. Konufólkið í húsinum høvdu gjørt klæðini uppá hann, og Petra hevði sjálv broderað vestin.

Síðan fer Olivur til Íslands at arbeiða. Einaferð í 1944 ger hann avtalu við eitt føroyskt skip um at sleppa heim til Føroya við teimum. Hann kemur umborð, men fer so í land aftur onkur ørindi. Orsakað av onkrari misskiljing, er skipið farið, tá Olivur skuldi koma umborð aftur. Men skaðin var ikki tann stóri, tí hann kundi sleppa heim við "Verdandi" í staðin. Men "Verdandi" kom ongantíð fram! Tá komu tey sjálvsagt at hugsa um, at Olivur má hava kent á sær, at hann var feigur, tá hann seldi síni føroysku klæðir! Uttan at vita um alt hetta, hevði Petra marru í dreymi viðvíkjandi Olivur um sama mundi, sum Verdandi hvarv.

## Pápin við til at stovna Føroya Fiskimannafelag

Pápi Sofus var upprunaliga fiskimaður, men tá hann fekk hesa mørkina í jørð, varð hann meira heima. Mørkin hevði 40 áseyðir og gjørdi hetta fittan mun til húsarhaldið.

Johan Salomon var ein av teimum 24 gøtumonnum, sum í desember 1910 tóku fyrsta stig at stovna Føroya Fiskimannafelag. Tað sama var Jóan Elias beiggi hansara. Millum aðrar stovnararar vóru annars Jóan David Jacobsen, sum seinni gjørdist verfaðir Sofus og beiggjnir hjá Onnu Louisu vermammuni, Óla Jákup og Jógvan Zachariassen. Hetta stig førdi til, at FF varð stovnað í november 1911.

Johan Salomon var ein av teimum mongu føroyingunum, sum róðu út á eysturlandinum í Íslandi. Hann var nógv í Borgarfirði norðanfyri Seyðisfjørðin. Hann var við tí, sum varð kallað Stóra Kompaní. Vanliga vóru tað bygdarmenn, sum vóru í felag, men her vóru tað menn úr ymiskum bygdum.

Tað hevur staðið ein mynd í bløðunum av "Stóra Kompaní." Á hesi mynd vóru 23 mans. Teir flestu vóru av Strondum og Gøtu. Menn vóru eisini við úr Lamba.

Onkur av Strondum stóð fyri tí. Um onkur veit meira um Stóra Kompaní, vilja vit fegin frætta.

Gøtumenn, sum Johan Salomon annars róði út saman við, vóru Líggjas hjá Hendrikki, sonur hansara Hans Andreas Husgaard, og eisini Sámal Jákup á Toft.

Sofus var á hesum leiðum í 1985 á einum túri við prestinum Peter Andrew Petersen. Tá varð vitjað á teimum gomlu útróðrarplássunum hjá føroyingum. Hetta var sera áhugavert.

At hetta framvegis hevur áhuga hjá føroyinum sást á túrinum, sum Smyril Line gjørdi nú í heyst á slóðini hjá føroyskum fiskimonnum á Eysturlandinum.